## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

### Virksemi

Vinnuframi varð settur á stovn sambært løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um vinnuframa grunn. Endamálið við Vinnuframa er, at hann skal stuðla vinnuni í avmarkaðan mun – uttan at veita rakstrar- og fløgustuðul. Grunnurin stuðlar tiltøkum, sum fjøltátta vinnulívið og økja um nýtsluna av vitan.

Kunngerð um virksemið og umsiting hjá Vinnuframa varð lýst 29. november 2001, har landsstýrismaðurin í vinnumálum – samsvarandi vinnupolitikki Landsstýrsins – staðfestir tey vinnugreinaøki, sum serligur dentur skal leggjast á at stuðla.

Umframt omanfyri nevnda virksemi, umsitur Vinnuframi eisini stuðulsskipan til skipasmíð, umsiting og játtan til Filmshúsið og ymiskar uppgávur fyri Vinnumálaráðið.

### Árið 2017

Stýrið fyri Vinnuframa legði dent á at stuðla ráðgeving, menning og sølu í 2017.

1. juli 2017 fóru Regin W. Dalsgaard, Sissal K. Kristiansen, Guðrið Andorsdóttir, Kári Kallsberg og Bárður Larsen úr stýrinum, tey høvdu tá sitið í 8 ár. Í nýggja stýrinum vórðu vald Dánial Hoydal, formaður, Rannvá Troest, Gudny Vang, Fróði Sivertsen og Lena L. Mohr.

Eins og undanfarin ár, er raksturin støðugt tillagaður soleiðis, at umsitingin átekur sær meira ráðgevingaruppgávur, ið áður vórðu røktar av uttanhýsis ráðgevum. Við hesum leisti metir stýrið, at stuðulin verður betur gagnnýttur til mennandi verkætlanir. Skipanin, har samskiparin er bindilið millum stýrið og umsøkjaran, ger at umsóknin verður skjótari viðgjørd, og umsøkjarin fær røttu ráðgevingina, viðvíkjandi møguleikum við tí góða hugskotinum.

Vinnuframi hevur í 2017 umsitið skipasmiðjustuðul, Horizon 2020 SME, sum er ES stuðul til smáar og miðalstórar fyritøkur, játtanina hjá Filmshúsinum og havt ábyrgd av umsitingini, verið eygleiðari í Nordic Innovation, umframt heimasíðuna www.invest.fo har m.a. spurningar verða svaraðir um fíggjarlig og skattlig viðurskifti í Føroyum.

Í 2017 hevur Vinnuframi lagt dent á at gerast enn meira sjónligur sum grunnur, so fleiri fáa kunnleika til teir møguleikar, sum grunnurin hevur at bjóða íverksetarum. Tí varð skipað fyri fleiri tiltøkum.

Samstarvið við Íverksetarahúsið í Klaksvík og Hugskotið í Havn er styrkt munandi seinastu árini, og í 2017 sást enn meira samstarv enn undanfarin ár. Vinnuframi avgjørdi í 2015 at gera Creative Business Cup til eitt samstarv og bjóðaði í tí sambandi báðum íverksetarhúsunum at vera við at skipa fyri

føroysku kappingini. Arbeitt verður framvegis miðvíst við at styrkja sambandið millum Vinnuframa og íverksetarahúsini, so íverksetarin fær bjóðað eina røð av møguleikum at menna sítt hugskot og sína verkætlan.

Síðani 2015 hevur verið arbeitt ítøkiligt við at lýsa stuðulsmøguleikarnar í ES skipanini Horizon 2020 SME, sum er fyri smáar og miðalstórar fyritøkur. Fyritøkan Frami fekk í 2015 sum tann fyrsta føroyska fyritøkan stuðul úr skipanini SME Instrument, tá fekk Frami 50.000 EUR til stig 1. Vinnuframi hevur áður latið Frama stuðul í sambandi við patent umsóknina, sum er ein partur av somu verkætlan. Vinnuframi hevur fingið samband við ein danskan serfrøðing, sum hevur havt ein stóran leiklut, tá skipanin SME Instrument bleiv gjørd, tí avgjørdi Vinnuframi á heysti 2015 at bjóða honum til Føroyar at hava eitt skeið í januar 2016, so føroyskar fyritøkur kundu fáa kunnleika til møguleikarnar í H2020 fyri smáar og miðalstórar fyritøkur. Hetta samstarv hevur gjørt, at fleiri føroyskar fyritøkur hava søkt um stuðul í skipanini SME Instrument seinastu árini og higartil hava tríggjar fyritøkur fingið stuðul.

Rentuinntøkurnar hjá Vinnuframa vóru í 2017 689 tkr. í mun til 182 tkr. í 2016.

Vinnuframi hevur viðgjørt 77 umsóknir í 2017, í mun til 64 umsóknir í 2016. Søkt varð um 12.085 tkr. í 2017 í mun til 9.360 tkr. í 2016. Í stuðli vórðu í 2017 veittar 3.650 tkr., meðan 666 tkr. vórðu afturførdar.

Við árslok 2017 var tøki peningurin 28.544 tkr., meðan játtaður, ikki útgoldin stuðul, var 3.732 tkr.

## Framtíðin

Tað eydnaðist í fleiri førum at gera Vinnuframa meira sjónligan í 2017, bæði online og við tiltøkum. Í 2018 verður arbeitt støðugt víðari við, at Vinnuframi skal gerast meira sjónligur og brúkaravinaligur, tí aðalmálið hjá Vinnuframa er, at stuðulin kemur út til tær verkætlanir, har hann ger størst gagn føroyska vinnulívinum at frama.

Vinnuframi hevur játtað at taka fleiri uppgávur á seg fyri Uttanríkis- og Vinnumálaráðið. Hesar uppgávur verða ein partur av umsitingini í 2018, millum annað umsitingin av Filmshúsinum.

Íverksetan í Føroyum skal vera meira samanhangandi og streymlinjað, tí vil Vinnuframi, saman við Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum og øðrum, sum varða av íverksetarum, arbeiða fyri, at íverksetarin fær betri møguleikar og umstøður at fremja sítt hugskot.

Góða samstarvið við íverksetarahúsini í 2017 heldur áfram, tí verður í 2018 talan um fleiri felags átøk og tiltøk, sum varpa ljós á íverksetan í Føroyum. Creative Business Cup verður millum annað aftur í 2018, umframt Vinnuframa, Hugskotið og Íverksetarahúsið, verður Fróðskaparsetur Føroya við at skipa fyri føroysku undankappingini, sum verður 23. august í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum. Føroyski vinnarin fer at luttaka í altjóða kappingini í Keypmannahavn, sum verður í november 2018. Í altjóða kappingini luttaka fleiri enn 50 lond.

Játtanin hjá Vinnuframa er á 3,2 mió. kr. og hon fylgir ikki við gongdini av umsóknum og tørvinum á stuðli, tískil er talan um fleiri og góðar verkætlanir, sum stýrið ikki kann ganga á møti grundað á vantandi fíggjarorku. Hetta er avgjørt ein avbjóðing fyri fleiri íverksetarar.

Ein onnur avbjóðing hjá føroyskum íverksetararum er, at í Føroyum eru fá, sum bjóða seg at fíggja ella gera íløgur í váðafúsar verkætlanir. Vinnuframi hevur í fleiri førum sæð góðar verkætlanir, sum steðga upp, grundað á, at ongin váðafúsur kapitalur er at finna í Føroyum. "The valley of death" er eitt kent fyribrigdi innan íverksetan, tó tykist trupulleikin at vera størri í Føroyum, tí onki felag hevur sokallaðan venture kapital. Vinnuframi hevur í fleiri førum gjørt vart við hetta og fer tí støðugt at varpa ljós á trupulleikan í 2018. Í samráð við tey, sum varða av íløgum- og fíggingarmøguleikum, vil Vinnuframi finna eitt felags stev fyri váðafúsar verkætlanir, so fleiri føroyskar verkætlanir kunnu gerast veruleiki.

**Verkætlanir frá 2017**

Niðanfyri sæst ein lýsing av fýra av teimum 45 játtaðu verkætlanunum, sum fingu stuðul í 2017. Tað eru fleiri aðrar áhugaverdar verkætlanir játtaðar, men tær eru m.a. vardar av upphavsrætti og verða tískil ikki lagdar fram fyri almenninginum, fyrr enn patent v.m. er avgreitt, ella tá vøran er komin á marknaðin.

**Verkætlan 1**

Umsøkjari: Farpay

Verkætlanin í stuttum: Sølu- og marknaðarátak á danska marknaðinum.

Lýsing: Farpay er ein føroysk KT fyritøka, ið hevur ment eina loysn, sum sameinir fakturasending, gjalding, og uppfylging av fakturum og uppkrøvum í eina samlaða loysn, ið ger tað lætt hjá fyritøkum og stovnum at innkrevja pening við nýmótans gjaldsloysnum.

Stuðul: Søkt varð um stuðul eftir stuðulsskipan 04 SØLA til eitt sølu- og marknaðarátak á danska marknaðinum. Stýrið gekk umsóknini á møti í desember 2017.

Endamál: Farpay hevur fleiri góðar og nøgdar kundar í Føroyum og hevur í eina tíð roynt seg á danska marknaðinum. Endamálið við hesi umsókn var at røkka tveimum segmentum í Danmark. Fyrra segmentið var smáar og miðalstórar fyritøkur og hitt var stórar fyritøkur.

Úrslit: Síðani lýsingarátakið fór av bakkastokki, er kundatilgongdin, av smærri og miðalstórum fyritøkum á danska marknaðinum, tvífaldað.

Fundir hava verið við nakrar av heilt stóru fyritøkunum í Danmark, nakrir kundar hava longu tikið av tilboðnum frá FarPay, meðan restin er í einari sera jaligari tilgongd. Stóra danska appin Mobilepay hevur gjørt samstarvsavtalu við FarPay, ið skal gera tað lættari hjá fyritøkum at gera fastar gjaldsavtalur í Mobilepay appini. Samstarvið hevur sera stóran týdning fyri FarPay, og er tað samstundis ein viðurkenning hjá føroysku KT fyritøkuni, at FarPay er ein fyritøku sum kappast á jøvnum føti við aðrar altjóða fyritøkur. Eisini hevur FarPay gjørt bæði samstarvsavtalu og fingið stóru donsku fyritøkuna e-conomic sum kunda. E-conomic er ein stór fyritøka sum selur eitt online roknskaparprogram við bókhald, fakturering og frágreiðingum til smáar og miðalstórar fyritøkur. Ein annar stórur kundi, sum tað hevur eydnast FarPay at gera avtalu við, er stóra danska ketan Fitness World, sum hevur venjingarmiðstøðir kring alt Danmark.
Sølu- og markaðarátakið er ikki liðugt enn, og FarPay væntar at jaliga gongdin heldur fram.

**Verkætlan 2**

Umsøkjari: Næla

Verkætlanin í stuttum: Hydroponisk velting í Føroyum

Lýsing: Næla er ein nýstovnað føroysk fyritøka, ið dyrkar salat, kryddurtir og ber á ein sokallaðan hydroponiskan hátt, tvs. innandura og uttan mold.

Stuðul: Søkt varð í november 2017 um stuðul eftir stuðulsskipanin 03 MENNING til at byggja hydroponiska royndaranleggið og síðani royna ymisk sløg av gróðri.

Endamál: Endamálið er at kanna, um tað letur seg gera at dyrka frukt og grønmeti, sum í síðsta enda er frískari og burðardyggari enn tann vøran, sum verður innflutt til føroyska marknaðin í dag.

Úrslit: Í dag er royndaranleggið sett upp í stórum gróðrartjøldum, so til ber at hava tamarhald á gróðrarlíkindunum rundan um planturnar. Fleiri royndir eru í gongd, millum annað við soppum og ymiskum gróðrum við salati og krýddurtum. Seinna helvt av 2018 skal vísa, um framleiðslan skal gerast á henda hátt, ella um hon skal broytast eitt sindur. Við síðurnar av tí stóra anlegginum verður í løtuni bygd ein sokallað food telda, sum við hjálp frá ymiskum sensorum skal máta umstøðurnar hjá plantunum.

**LEIÐSLUFRÁGREIÐING**

---

**Verkætlan 3**

Umsøkjari: Neysting

Verkætlanin í stuttum: Varðveita føroysku neystini sum arkitketoniskan mentanararv og útleiða neystini til ferðafólk.

Lýsing: Neysting er eitt nýstovnað føroyskt ÍVF, ið arkitekturin, Elin Maria Nolsøe Joensen og býarplanleggjarin Sissal Christina Fosaa, eiga. Verkætlanin er ein víðarimenning av kandidatverkætlanini hjá Elin Mariu frá arkitektskúlanum í Keypmannahavn og tekur hon útgangsstøðið í gomlu føroysku neystunum.

Stuðul: Søkt var fyrstu ferð um stuðul til verkætlanina í mars 2017 eftir stuðulsskipanini 03 MENNING.

Endamál: Endamálið við verkætlanini er at varðveita føroysku neystini og skapa møguleikan at gista ymsa staðni í Føroyum, í neystunum, sum longu standa niðri í fjøruni. Í hvørjum neysti verður eitt tjald úr ull hongt upp, har tvey til fýra fólk kunnu sova. Tjaldið er sniðgivið og teknað við íblástri frá føroyska útróðrarbátinum, og er á støðd við eitt 8 mannafar. Sjálvt neystið verður ikki broytt. Á henda hátt fær gesturin møguleika at gista heitt og fjálgt í einum autentiskum føroyskum neysti, tætt fjøruni og øllum teimum sansum, sum har til hoyra. Sum ein partur av verkætlanini verður ein vallaraleið gjørd har gesturin kann ganga frá neysti til neyst. Vallaraleiðin kann samanberast við Caminoin gjøgnum Frakland og Spania. Endamálið er at skapa ein nýggjan møguleika í ferðavinnuni og ein øðrvísi hátt at ferðast og gista hjá bæði útlendsku ferðafólkunum og hjá føroyingum, sum ferðast í egnum landi.

Úrslit: Verkætlanin er í dag á seinasta stig at menna prototypuna, og verður hon vantandi liðug á sumri 2018. Protypan kann býtast í fýra partar, viður, dúkur, stál og uppsetan. Summarið 2018 skal brúkast at royna prototypuna, tá ferðafólk fara at royna prototypuna, ið verður sett upp í einum neysti í Froðba. Í dag arbeiða trý fólk við verkætlanini Neysting.

**Verkætlan 4**

Umsøkjari: SafeFriend

Verkætlanin í stuttum: SafeFriend er ein nútímans app og ein knøttur, sum kann veita hjálp til fólk í neyð.

Lýsing: SafeFriend er vøran hjá nýstovnaðu fyritøkuni Northlight Technologies Sp/f. SafeFriend er ein knøttur, sum kann kann senda signal til útvaldar brúkarar. Á henda hátt er SafeFriend eitt tól, sum kann brúkast av fleiri ymiskum segmentum, ið hava eina fartelefon uppi á sær. Gjøgnum bluetooth verður signalið sent til teir persónar, sum brúkarin frammanundan hevur valt. Móttakarin sær síðani positionina hjá tí, sum hevur trýst á knøttin og fær sjálvur hjálpt ella boðsent hjálp. Málbólkarnir eru fólk í stórbýum, sum hava tørv á tryggleika og møguleika at boða frá, at teimum tørvar hjálp. Fólk sum ferðast í náttúrini, ganga seg í óføri og hava tørv á at senda boð um hjálp. Starvsfólk og onnur, sum arbeiða á stovnum og kunnu koma í støður, har tey hava tørv á hjálp.

**LEIÐSLUFRÁGREIÐING**

---

Stuðul: Í juni 2017 varð søkt um stuðul til 03 MENNING, í oktober varð søkt um stuðul til sølu eftir stuðulsskipan 04 SØLA og í desember varð søkt um stuðul til ráðgeving eftir 02 RÁÐGEVING.

Endamál: Endamálið er at liðugt menna knøttin samstundis sum vøran skal góðkennast og arbeitt verður við marknaðarføringini, áðrenn sølan veruliga kann fara í gongd. Avtalur skulu eisini gerast við detailhandlar, sum skulu selja til endabrúkaran, og verður SafeFriend at finna á hillum við síðurnar av vørum frá m.a. Apple.

Úrslit: SafeFriend er í dag á seinasta royndarstigi, og vøran kemur á maknaðin í seinnu helvt av 2018. Í november 2017 varð verkætlanin løgd fram fyri íleggjarum, tá varð avtalað gjørd við danska ívirksetaran Jesper Buch, sum keypti 25% av fyritøkuni, og hevur samstarvið við Jesper Buch opnað fleiri hurðar og veruliga fingið verkætlanina á glið. Fleiri aðrir íleggjarar hava eisini víst verkætlanini áhuga.

## Hagtøl




Játtaði stuðulin hjá grunninum seinastu fimm árini (í túsund krónum):

| | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | Samanlagt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ráðgeving** | 150 | 609 | 605 | 465 | 287 | 2116 |
| **Menning** | 766 | 1810 | 1810 | 915 | 2444 | 7745 |
| **Søla** | 1492 | 1302 | 950 | 1252 | 919 | 5915 |
| **Íalt** | **2408** | **3721** | **3365** | **2632** | **3650** | **15776** |




Samlað fyri árini 2013-2017 hevur býtið verið soleiðis millum ymisku sløgini av stuðli: